# Jón Rói við hjartanum í hálsinum

**Eftir dyggan samanbrest fekk hann sunnudagin løst í sama knæið, sum hann áður hevur verið krossbandsskaddur í**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Fyrsti landskappingardysturin eftir vetrarsteðgin endaði hjá Jón Róa Jacobsen á skaðastovuni á sjúkrahúsinum í Hvidovre:

– Tað fóru nógvar hugsanir ígjøgnum høvdið, tá ið eg sá, at tað bløddi úr knænum, sum eg áður hava verið krossbandsskaddur í. Ta ferðina var eg burturi frá fótbólti í næstan eitt ár. Pínan var ógvuslig. Neyðugt var at taka fýra pentur í, men tíbetur verður sagt, at talan bara er um dygt slag, og at hvørki krossbandið ella liðbondini eru skadd. Læknin sigur seg rokna við, at eg kann vera við, tá ið Frem hósdagin fer at spæla toppdyst í Haderslev. Men í løtuni havi eg ilt við at ímynda mær, at tað fer at bera til. Knæið er ógvuliga hovið, og eg fái so at siga ikki sett beinið undir meg.

Tað er Jón Rói Jacobsen, sum er í telefonini. Sunnudagin vunnu hann og liðfelagarnir í Frem á heimavølli 4-2 á Ølstykke. Úrslitið ber við sær, at Frem styrkti sína støðu í toppinum. Í 69. minutti var Jón Rói so mikið skaddur, at hann noyddist av vøllinum. Orsaka av skaðasteðginum legði dómarin sjey minuttir afturat vanligu leiktíðini.

– Eg var farin framvið, og tað var í nærdysti væl inni á hálvuni hjá Ølstykke, at samanbresturin var so mikið óheppin, at tað ikki bar mær til at spæla meiri. Í dag fari eg út í Frem. Læknin hjá okkum fer at hyggja upp á knæið, og eg vóni sanniliga, at tað ikki er annað enn pína eftir dyggan samanbrest, sigur Jón Rói Jacobsen.

– Eg orki næstan ikki at hugsa um, hvussu tað hevði verið, um eg aftur nú hevði havt verið álvarsliga skaddur.

# FCK nærkast toppinum

**Fyri triðju ferð á rað vann heimaliðið 4-0 í landskappingardysti í Parkini, og heldur ikki hesa ferð var pláss fyri Toda Jónsson í FCK hópinum**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Tað gongur strúkandi hjá FCK, og Todi Jónsson eigur lítlan og ongan lut í viðrákinum. Tað er veruleikin hjá einasta útisetanum í bestu donsku deildini.

Eftir venjingina leygardagin var tað greitt, at Hans Backe heldur ikki hesa ferð ætlaði at hava Toda Jónsson í hópinum. Harvið varð enn eina ferð staðfest, at í løtuni roknar FCK venjarin føroyska álopsspælaran sum at vera tann fimti í røðini til tey bæði plássini í fremstu ketuni.

Hvussu tað fer at vera hjá Toda Jónsson næstu vikurnar valdast ivaleyst bara um, hvussu tað verður við skaðum og leikbannum hjá hinum álopsspælarunum. Sunnudagin kom Zuma ikki á vøllin eftir steðgin. Hann var skaddur, og Jesper Bech loysti hann av. Hvussu álvarsligur skaðin var, hevði einki verið at hoyrt um, tá ið blaðið fór til prentingar.

Jesper Beck spældi so mikið væl tey trý korterini, sum hann var á vøllinum, at hann varð roknaður sum dagsins maður. Tá ið tjúgu minuttir vóru farnir av 2. hálvleiki hevði hann skorað tvær ferðir, og fram ímóti dysdarenda legði hann upp til 4-0 málið, sum Magne Hoseth skoraði.

Randers royndi at sprella eitt sindur fyrstu løtuna. Álvaro Santos setti hol á fyri FCK, eftir at Silberbauer hevði átt alt uppspælið. FCK liðformaðurin Bo Svensson bjargaði á strikuni, og so var næstan bara spælt til Randers málið.

Hetta var triðja ferðin á rað, at FCK vann 4-0 á heimavølli í landskappingini. Næstsíðsta sunnudag legði FCM rygg til stórtap, og í november tapti AaB 4-0 í Parkini.

### Hini í toppinum

Brøndby er framvegis oddalið. Teir eru ellivu stig frammanfyri FCM ella eitt fleiri, enn teir vóru, tá ið tað varð farið undir aftur kappingina eftir vetrarsteðgin. Fyri aðru ferð á rað spældi Brøndby javnt. Næstsíðsta sunnudag var úrslitið 1-1 á heimavølli ímóti FCM. Hesa ferð var úrslitið málleysur javnleikur á útivølli í Esbjerg.

Fleiri áskoðarar úr Brøndby vórðu handtiknir í Esbjerg sunnukvøldið. Teir vóru neyvan misnøgdir við úrslitið, um roknað verður út frá spælbýti og møguleikum. Heimaliðið var greitt omaná, og tað var sera óheppið, at teir ikki fingu eitt ella tvey mál.

Í Brøndby halda teir onga orsøk vera at stúra. Men tað er ikki fara aftur við borðinum uttan víðari, at FCK tveir teir seinastu sunnudagarnar hevur tikið seg fýra stig inn á Brøndby. FCK er nú eitt stig frá næstfremsta plássinum. Næsta umfar verður á skránni 2. apríl. Tá verður toppdystur í Brøndby, har FCM fer at vitja, meðan FCK skal spæla í Odense. OB er nummar fýra.

### Langt niður til botnin

Viborg, sum er á fimta plássinum, vitjaði í Herfølge. Heimaliðið, sum er mæstaftast, legði seg framum, men Viborg javnaði, og úrslitið í keðiligu uppgerðini gjørdist 1-1.

Gomlu feløgini, AaB og AGF, stóðu seg væl sunnudagin. AaB vann sannførandi 3-1 heimasigur á uppflytarunum úr Silkeborg, og AGF vann 2-1 á FCN. Tá ið støðan var 1-1 og tíggju minuttir vóru eftir, misnýtti AGF brotsspark, men teir megnaðu kortini at skora sigursmálið.

Tað vísir seg mest sum hvørt ár, at í hvussu so er annar uppflytarin flytir niður aftur. Í løtuni er Randers, sum flutti upp í fjør, aftast, meðan hin uppflytarin, Silkeborg, er fjórði aftast. Silkeborg er seks stig frá niðurflytingar strikuni. Herfølge er saman við Randers undir strikuni. Einasta felagið, sum saman við teimum báðum undir strikuni er í álvarsligum vanda at flyta niður, er FCN.

**Danska superligan**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby (S) | 20 | 13 - 6 - 1 | 32 | 11 | 21 | 45 |
| 2 FCM | 20 | 10 - 4 - 6 | 29 | 28 | 1 | 34 |
| 3 FCK (M) | 20 | 9 - 6 - 5 | 37 | 27 | 10 | 33 |
| 4 OB | 20 | 9 - 4 - 7 | 42 | 24 | 18 | 31 |
| 5 Viborg | 20 | 8 - 7 - 5 | 24 | 20 | 4 | 31 |
| 6 AaB | 20 | 8 - 5 - 7 | 32 | 27 | 5 | 29 |
| 7 AGF | 20 | 8 - 5 - 7 | 34 | 34 | 0 | 29 |
| 8 Esbjerg | 20 | 7 - 6 - 7 | 36 | 31 | 5 | 27 |
| 9 Silkeborg | 19 | 6 - 3 - 10 | 29 | 36 | -7 | 21 |
| 10 FC Nordsj. | 19 | 4 - 4 - 11 | 23 | 39 | -16 | 16 |
| 11 Herfølge | 19 | 4 - 3 - 12 | 16 | 39 | -23 | 15 |
| 12 Randers FC | 19 | 3 - 5 - 11 | 20 | 38 | -18 | 14 |

Føroyskir leikarar: Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 AC Horsens | 15 | 11 - 2 - 2 | 31 | 12 | 19 | 35 |
| 2 Frem | 16 | 10 - 4 - 2 | 35 | 11 | 24 | 34 |
| 3 Sønderjyske E | 15 | 9 - 3 - 3 | 40 | 17 | 23 | 30 |
| 4 HIK | 15 | 8 - 3 - 4 | 29 | 21 | 8 | 27 |
| 5 Køge | 15 | 7 - 5 - 3 | 34 | 19 | 15 | 26 |
| 6 Vejle | 15 | 8 - 1 - 6 | 35 | 28 | 7 | 25 |
| 7 Fremad Am. | 15 | 6 - 6 - 3 | 25 | 14 | 11 | 24 |
| 8 Skjold | 15 | 7 - 3 - 5 | 23 | 23 | 0 | 24 |
| 9 Fredericia | 15 | 6 - 5 - 4 | 26 | 19 | 7 | 23 |
| 10 AB | 15 | 6 - 3 - 6 | 29 | 28 | 1 | 21 |
| 11 Brønshøj | 15 | 4 - 4 - 7 | 24 | 31 | -7 | 16 |
| 12 NFA | 15 | 4 - 3 - 8 | 29 | 38 | -9 | 15 |
| 13 B 93 | 15 | 2 - 5 - 8 | 26 | 40 | -14 | 11 |
| 14 Næstved | 15 | 3 - 2 - 10 | 15 | 36 | -21 | 11 |
| 15 Ølstykke | 16 | 2 - 2 - 12 | 22 | 53 | -31 | 8 |
| 16 Dalum | 15 | 2 - 1 - 12 | 24 | 57 | -33 | 7 |

Føroyskir leikarar: Gunnar Nielsen Jón Rói Jacobsen (Frem), Andrew av Fløtum (Fremad Amager), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)

**Danska 2. deild**

| | d | v - j - t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brabrand | 14 | 10 - 2 - 2 | 36 | 18 | 18 | 32 |
| 2 Jetsmark | 15 | 9 - 3 - 3 | 40 | 25 | 15 | 30 |
| 3 Kolding FC | 15 | 10 - 0 - 5 | 29 | 20 | 9 | 30 |
| 4 Holbæk | 15 | 9 - 2 - 4 | 29 | 18 | 11 | 29 |
| 5 Glostrup | 15 | 9 - 2 - 4 | 35 | 25 | 10 | 29 |
| 6 Lyngby | 15 | 9 - 1 - 5 | 35 | 20 | 15 | 28 |
| 7 Slagelse | 15 | 7 - 5 - 3 | 26 | 18 | 8 | 26 |
| 8 Næsby | 15 | 6 - 3 - 6 | 25 | 21 | 4 | 21 |
| 9 Aarhus Fremad | 14 | 5 - 3 - 6 | 25 | 21 | 4 | 18 |
| 10 FC Roskilde | 15 | 6 - 0 - 9 | 18 | 28 | -10 | 18 |
| 11 B 1913 | 15 | 4 - 4 - 7 | 22 | 30 | -8 | 16 |
| 12 B 1909 | 15 | 4 - 4 - 7 | 12 | 21 | -9 | 16 |
| 13 Hjørring | 15 | 3 - 5 - 7 | 17 | 24 | -7 | 14 |
| 14 Holstebro | 15 | 3 - 2 - 10 | 20 | 33 | -13 | 11 |
| 15 Værløse | 15 | 3 - 1 - 11 | 17 | 47 | -30 | 10 |
| 16 Kalundborg | 15 | 2 - 3 - 10 | 23 | 40 | -17 | 9 |

Føroyskir leikarar: Christian Holst Lamhauge (Lyngby)

**Enska Premier League**

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Chelsea | 30 | 24 - 5 - 1 | 58 | 10 | 48 | 77 |
| 2 Man. Utd. | 30 | 19 - 9 - 2 | 48 | 17 | 31 | 66 |
| 3 Arsenal | 30 | 19 - 7 - 4 | 68 | 32 | 36 | 64 |
| 4 Everton | 30 | 15 - 6 - 9 | 35 | 32 | 3 | 51 |
| 5 Liverpool | 30 | 14 - 5 - 11 | 43 | 31 | 12 | 47 |
| 6 Bolton | 30 | 13 - 7 - 10 | 38 | 34 | 4 | 46 |
| 7 Charlton | 30 | 12 - 7 - 11 | 35 | 42 | -7 | 43 |
| 8 Tottenham | 30 | 12 - 6 - 12 | 37 | 34 | 3 | 42 |
| 9 Middlesbrough 3011 - 9 - | | | 10 | 44 | 42 | 213 |
| 10 Newcastle | 29 | 9 - 11 - 9 | 41 | 45 | -4 | 38 |
| 11 Aston Villa | 30 | 10 - 8 - 12 | 34 | 39 | -5 | 38 |
| 12 Man. City | 30 | 9 - 9 - 12 | 35 | 34 | 1 | 36 |
| 13 Birmingham | 30 | 9 - 8 - 13 | 33 | 37 | -4 | 35 |
| 14 Blackburn | 30 | 7 - 11 - 12 | 25 | 37 | -12 | 32 |
| 15 Portsmouth | 30 | 8 - 7 - 15 | 32 | 46 | -14 | 31 |
| 16 Fulham | 29 | 8 - 6 - 15 | 33 | 47 | -14 | 30 |
| 17 Southampton | 30 | 5 - 12 - 13 | 33 | 45 | -12 | 27 |
| 18 Crystal Pal. | 30 | 6 - 8 - 16 | 33 | 49 | -16 | 26 |
| 19 WBA | 30 | 4 - 12 - 14 | 29 | 51 | -22 | 24 |
| 20 Norwich | 30 | 3 - 11 - 16 | 29 | 59 | -30 | 20 |

**Enska League Championship**

| | d | v - j - t | mál | v mál | t +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Sunderland | 39 | 24 - 6 - 9 | 64 | 34 | 30 | 78 |
| 2 Wigan | 39 | 22 - 10 - 7 | 70 | 30 | 40 | 76 |
| 3 Ipswich | 39 | 21 - 10 - 8 | 69 | 44 | 25 | 73 |
| 4 Preston | 39 | 18 - 10 - 11 | 55 | 50 | 5 | 64 |
| 5 Derby | 38 | 17 - 10 - 11 | 56 | 47 | 9 | 61 |
| 6 Sheff Utf. | 38 | 16 - 10 - 12 | 47 | 47 | 0 | 58 |
| 7 Reading | 38 | 15 - 12 - 11 | 43 | 35 | 8 | 57 |
| 8 West Ham | 38 | 16 - 8 - 14 | 53 | 49 | 4 | 56 |
| 9 QPR | 38 | 16 - 8 - 14 | 47 | 46 | 1 | 56 |
| 10 Millwall | 39 | 15 - 10 - 14 | 41 | 35 | 6 | 55 |
| 11 Stoke | 38 | 15 - 10 - 13 | 29 | 27 | 2 | 55 |
| 12 Leeds | 39 | 13 - 14 - 12 | 44 | 42 | 2 | 53 |
| 13 Wolverh. | 39 | 11 - 18 - 10 | 58 | 52 | 6 | 51 |
| 14 Burnley | 38 | 12 - 13 - 13 | 30 | 34 | -4 | 49 |
| 15 Watford | 39 | 10 - 15 - 14 | 47 | 51 | -4 | 45 |
| 16 Crewe | 39 | 11 - 12 - 16 | 57 | 70 | -13 | 45 |
| 17 Leicester | 37 | 9 - 17 - 11 | 39 | 38 | 1 | 44 |
| 18 Plymouth | 39 | 12 - 8 - 19 | 46 | 58 | -12 | 44 |
| 19 Brighton | 38 | 12 - 8 - 18 | 33 | 54 | -21 | 44 |
| 20 Cardiff | 38 | 10 - 12 - 16 | 39 | 42 | -3 | 42 |
| 21 Gillingham | 39 | 11 - 9 - 19 | 38 | 58 | -20 | 42 |
| 22 Coventry | 39 | 10 - 11 - 18 | 47 | 62 | -15 | 41 |
| 23 Notm For. | 38 | 8 - 14 - 16 | 36 | 54 | -18 | 38 |
| 24 Rotherham | 39 | 4 - 13 - 22 | 29 | 58 | -29 | 25 |

Føroyskir leikarar: Claus Bech Jørgensen (Coventry)